# Bilur útav í Neslíð



*Mánadagin fór ein bilur útav í Neslíð*

(Mynd:D.Olsen)

**Nakað yvir klokkan 15 mánadagin fór ein bilur útav av vegnum í Neslíð, ið er miðskeiðis millum Nes og Vág**

FERÐSLUÓHAPP
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Bilurin er komin úr Porkeri mótvegis Vági. Førarin hevur greitt frá, at hann sovnaði, og bilurin er farin oman gjøgnum bøin, ein teinur á eini 50-100 metrar, og er so farin útav og oman í fjørðina. Har bilurin er farin úr bønum og í fjørðuna er nokkso høgt niður, kanska einar 10 metrar. Á veg omaneftir er eldur eisini komin í bilin, men eldurin er køvdur, tá bilurin endaði hálvur í fjørðuni og hálvur úti í sjónum.

Førarin, ið er ungur maður, ið ikki hevur havt koyrikort longi, var einsamallur í bilinum og hann fekk ikki størvegis skaða.

Heimasíðan hjá Suðurrás visti í gjár at siga, at menn umhugsa, hvørt bilurin skal takast upp við kranabili ella báti við krana, t.d. einum alibáti.

## Føroyskur tónleikur og G! í Morgunblaðnum

**Íslendska Morgunblaðið prentaði 30. juli drúgva grein um føroyskan tónleik**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Arnar Eggert Thoroddsen hevur vitjað í Føroyum og hevur hann skrivað greinina í Morgunblaðnum.

Fyrst verður greitt frá bygdini Gøtu í tónleikahøpi og um tann stóra týdning, sum bygdin, og tað sum haðani er komið, hevur havt fyri føroyskan tónleik. Komið verður eisini inn á føroysku bylgjuna í Íslandi, sum neyvan enn heilt hevur lagt seg.

Arnar hevur hitt Kristian Blak og Sólarn Solmunde og práta um tónleik og hann hevur vitjað á G! Og hitt Jón Tyril. Arnar sigur seg minnast, tá menn bygdu dreymaborgir um G!. Menn tosaðu eins og íslendingar! Men Arnar metti, at føroysingar vóru róligari, enn íslendingar, so tað lagaði seg nokk.

Men nú hann vitjaði G!, sótu fólk í hópatal á skrivstovuni hjá G! og alt gekk upp á stáss á flottum og vælskipaðum festivali.

Greinin er áhugaverd og hevur áhugaverdar hugleiðingar. Sum t.d. um munin á Íslandi og Føroyum, um hví føroyingar í hugaheimi greinskrivarans eru so aftarliga tá hugsað verður um t.d. tónleik, fosturtøku, kynsligt samband og samband við danir.

Men greinin er fyrst og fremst um tónleik og er tað nakað sum greinskrivarin saknar í føroyskum tónleiki, so er tað okkurt meira ævintýrkent og serføroyskt. Tað er ikki nóg mikið at duga at ljóða sum onnur úti í heimi, sigur greinskrivarin, tí ein má hinvegin koma við onkrum serstøkum sjálvur, um tað skal bera ein longur á leið.

Hetta hava íslendskir bólkar eisini ásanna so ofta, skrivar greinskrivarin millum so nógv annað í áhugaverdu greinini í Morgunblaðnum.




Vika 31

# Miðbankar í andgletti

MARKNAÐARRÁK

Higartil í ár hava miðbankarnir havt ein stóran leiklut í tí, sum er farið fram á virðisbrævamarknaðunum. Amerikanski tjóðbankin hevur rentufund í næstu viku. Tey, ið meta at rentuhækkingarnar, ið hava verið trúgvar síðan 2004, fara at steðga, verða fleiri og fleiri. Hesi fingu meira vind í seglini í farnu viku. Tá varð kunngjørt, at amerikanski búskapurin vaks 2,5% p.a. í 2. ársfjórðingi, og hetta var væl minni enn væntað. Hetta fekk partabrøv at hækka 1%-2%. Av hesum sæst, at partabrævamarknaðurin í løtuni leggur størri dent á møguleikan fyri, at rentuhækkingarnar steðga, enn á at ferðin á búskapinum er minni enn væntað. Vit hava fyrr skrivað um, at tá rentuhækkingarnar enda, fara partabrøv væntandi at hækka meir. Tó kann vera, at Fed hækkar rentuna einaferð aftrat, tí prísvøksturin hækkar enn. Evropiski miðbankin, ECB, fer væntandi at hækka rentuna hósdagin, so hon kemur upp á 3%.

### Lánsbrævarentur støðugar

Lánsbrøvini hava havt eina friðarliga viku. 10-ára rentan er 3,97%, á leið sum fyri viku síðan. Hendan rentan hevur liggið millum 3,9%-4,2% seinastu 4 mánaðirnar, og hetta er rættiliga leingi.

### Góðir roknskapir

Nú 337 av teimum 500 roknskapunum í S&P 500 vísitalinum eru kunngjørdir, eru 70% av roknskapunum jaligari enn áður mett, og hetta er ein vøkstur uppá 5% í mun til í farnu viku. Norsk Hydro, BP og Shell kunngjørdu góðar roknskapir í vikuni. Roknskapurin hjá Statoil var hinvegin verri enn greinarar høvdu mett. Aðru viku á rað hækkaðu partabrøv, og gongdin hesa vikuna verður m.a. tengd at gongdini í miðeystri og amerikanska arbeiðsmarknaðinum.

### Hesa vikuna

Komandi vikan verður hendingarík á virðisbrævamarknaðunum. Millum annað kemur amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri juli fríggjadagin. Hon fær stóran týdning fyri, um amerikanski tjóðbankin aftur fer at hækka rentuna, tá rentufundur verður 8. august.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 585,09 | -0,9% | ↓ |
| JPY | 5,11 | 1,0% | ↑ |
| GBP | 1.091,11 | -0,2% | ↓ |
| NOK | 94,85 | 1,2% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 97,68 | 0,2% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 108,92 | 4,6% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*